# Tvørafólk spyrjast um at leggja kommunur saman

**Tvøroyrar Býráð fer nú at spyrja borgarar um, hvussu nógvar kommunur skulu vera í Suðuroynni**

KOMMUNU-VIÐURSKIFTI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vit í Býráðnum fara ikki at taka støðu um kommunu-samanlegging, uttan at spyrja bogararnar fyrst, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri*

**Tvøroyri:** Spurningurin um at leggja kommunur saman, hevur verið nógv frammi seinastu árini.

Rákið er tann vegin, at kommunur verða lagdar saman og tað er eisini hent í fleiri førum.

Eisini í Suðuroy hevur spurningurin verið viðgjørdur.

Men nú tekur Tvøroyrar Kommuna eitt ítøkiligt stig fyri at reisa spurningin ímillum borgararnar í kommununi.

Og helst fer hetta eisini at kynda uppundir orðaskiftið ímillum manna um, hvussu nógvar kommunur skulu vera í Suðuroynni.

Á býráðsfundi í seinastu viku, samtykti Tvøroyrar Býráð at at senda út spurnarbløð til allar veljarar í kommununi við nøkrum spurningum um kommunuviðurskifti.

Sostatt fara ímillum 1300 og 1400 veljarar í Tvøroyrar Kommunu í næstum at fáa spurnarblað frá kommununi, har tey verða biðin um at siga sína hugsan um, hvussu nógvar kommunur skulu vera í Suðuroynni.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, væntar, at spurnarbløðini verða send út í næstu viku og miðað verður ímóti at fáa tey innaftur fyri árslok.

Spurnarbløðini eru dulnevnd, so nøvnini á teimum, sum svarað, verða ongastaðni skrásett.

### Vegleiðandi fyri býráðið

Á spurnarblaðnum verða fólk spurd um tey halda, at Suðuroyggin skal vera ein kommuna, um hon skal vera tvær kommunur, ein í syðru helvt og ein í norðaru helvt, ella um Tvøroyri framhaldandi skal vera ein kommuna fyri seg sjálva.

Samstundis verður spurt um aldurin á tí, sum svarar og um talan er um mannfólk ella konufólk.

Kristin Michelsen sigur, at býráðið tekur hetta stigið fyri at hava okkurt at hella seg til, tá ið býráðið skal taka støðu til spurningin - tí tað ivast hann ikki í, at býráðið kemur at gera, antin hetta býráðið, ella tað komandi.

– Hetta er so mikið stórt mál, at vit fara ikki at smoyggja eina avgerð niðuryvir bogarararnar, uttan at spyrja teir eftir fyrst, sigur hann.

Hann sigur, at hetta tískil er fyrsta stigið hjá býráðnum at lodda dýpið hjá borgarunum, men hann sigur, at áðrenn endalig avgerð verður tikin, verður eisini fólkaatkvøða.

– Tað má vera veljarin sjálvur, sum hevur endaligu avgerðina, sigur borgarstjórin.

Kristin Michelsen sigur, at tað, hann sær fyri sær, er, at landið leggur fleiri og fleiri málsøki til kommunurnar at umsita.

– Tað kann gerast trupult hjá hvørjari einstakari kommunu at umsita øll hesi málsøkini og tí sleppa vit ikki undan at viðgerða spurningin um at leggja kommunur saman, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

### Endurreisa felagskommunu

Samstundis hevur eisini verið upp á tal at endurreisa felagskomununa í Suðuroy. Kristin Michelsen sigur, at Tvøroyrar Býráð hevur spurt allar kommunur um áhugi er fyri at endurreisa felagskommununa. Allar hava svarað játtandi, uttan Vágs Kommuna, sum ikki tekur undir við tí.

Hetta heldur Kristin Michelsen er spell, tí tað er nógv mál av felags áhuga, sum ein slík felagskommuna kundi viðgjørt.

# Tvøroyri friðast fyri seyð

**Í nógv ár hevur Tvøroyrar Býrað tosað um at friða býin fyri seyð, men nú skal tað vera, sigur borgarstjórin**

VETRARFRIÐING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Eisini á Tvøroyri hevur leysgangandi seyður verið ein stórur trupulleiki, men nú verða fyrstu stigini tikin til at vetrarfriða býin*

**Tvøroyri:** Seyður, sum gongur leysur og melur ímillum húsini hevur verið ein plága hjá mongum.

Ongin urtagarður og onki tún fær frið fyri teimum ferføttu og tað er heldur ikki lukkuligt at hava úthurðina til hurðina til bilskúrðin, opna, tí so er vandi fyri, at tað er fult at seyði inni.

Hetta hevur ført við sær, at nógva staðni eru bygdir og býir friðaðar fyri seyð.

Hendan trupulleika kenna ikki minst tvørafólk til. Hetta veit býráðið eisini av og tað er eisini mong ár síðani, at Tvøroyrar Býráð tók spurningin um vetrarfriðing upp og síðani hevur hann ofta verið til umrøðu. Higartil er tað ikki blivið til meiri enn tos.

– Men nú skal tað vera, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at á næstu fíggjarætlan ætlar býráðið at seta eina millión krónur av til at stongja seyðin úti frá býnum um veturin.

Borgarstjórin sigur, at seyðurin hevur rætt til vetrarbit heilt oman í mølina og tí kann Tvøroyri ikki vetrarfriðast uttan samráðingar við hagarnar og uttan at hagarnir góðtaka tað.

Tvøroyrar Kommuna hevur eisini tann vansa, at hon er ógvuliga víðfør, heilt úr Forðba til Øravíkar og tí er tað eitt ógvuliga kostnaðarmikið tiltak at vetrarfriða alla kommununa.

Borgarstjórin ásannar eisini, at tað verður ikki gjørt í einum, tí tilsamans skulu einar 12-15 kilometrar av stiki setast upp, skal øll kommunan friðast fyri seyð, samstundis sum avtala skal gerast við hagarnar, rulluportur gerast o.s.fr. Hann sigur, at býráðið hevur tosað óformliga við fleiri hagar og teir eru ikki óviljaðir til at Tvøroyri verður vetrarfriðað.

Nú skulu so beinleiðis samráðingar takast upp við hagarnar og tað skal eisini mátast upp, hvat hvør hagi missur av vetrarbiti.

Fæst ein avtala við hagarnar, er ætlanin at brúka milliónina, sum ætlanin er at seta av næsta ár, til eitt býarstik uttanum Tvøroyri.

Hann sigur, at býráðið vónar at kunna stika Tvøroyri inni frá gamla grótbrotinum inn ímóti Ítróttarhøllini.





Føroya løgmaður
Tinganes
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Vientiane 19. oktober 2003

**Góði løgmaður.**

Vit hava frætt, at politiski andstøðingurin, Ólavur Petursson, hevur verið illa píndur, meðan hann hevur verið í varðhaldi í landi tygara. Nógv bendir á, at henda píning er farin fram, tí Ólavur Petursson hevur aðra hugsan enn stjórnin í Føroyum. Vit vita eisini, at harra Petursson enn eina ferð er fongslaður og hevur sitið innibyrgdur síðan mai í ár, uttan at hann hevur verið fyri rættin.

Góði løgmaður! Vit vilja staðiliga mæla ímóti, at tygum lata slíkt fara fram í Føroyum. At hava og tora at gera vart við politiskar hugsanir er ein mannarættur, ið er galdandi fyri øll. Tí heita vit á tygum um at lata Ólav Petursson leysan alt fyri eitt. Øll hava rætt at hava egnar áskoðanir uttan at verða fongslað av órøttum og pínd: Eisini Ólavur Petursson og aðrir borgarar, ið hava verið illa viðfarnir av myndugleikunum, ið tygum sum løgmaður hava ábyrgdina av!

Vinaliga

Thao Yang
Luang Prabang Road 49
P.O. BOX 6977
Vientiane
Laos

... tíbetur er slíkt ikki veruleiki í Føroyum! Men tað er tað aðrastaðni í heiminum. Tí bjóðar Amnesty International í Føroyum tær at vera partur av heimsumfatandi átakinum, Skriva fyri lívi. Kom inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. So fært tú trý teldubrøv um mánaðin, sum tú kanst skriva út og senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin. **Kom og skriva fyri lívi.**

amnesty.fo

SANSIR TEL 355355

VIÐ LOYVI FRÁ LØGMANNI